KLINTRA
Software Solutions

LM-063/2023: Uppskot til løgtingslóg um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina.

Viðmerkingar frá Sp/F Klintra

Fyrst av øllum harmast vit um útboðsleistin. Valdi leisturin gevur verkætlanini váða og játtanarmyndugleikanum avmarkaðan møguleika fyri eftirliti.

Útboðsleisturin leggur ikki upp til javnbjóðis kapping, og kann ikki brúkast sum grundarlag til at meta um hetta er besta loysnin og rætti kostnaðurin fyri nýggja kt-skipan til barsilsskipanina. Útboðið, sum víst verður til í lógarviðmerkingunum, umbiður ikki eitt boð uppá bestu loysnina ella hvat ein slík skal kosta. Tað er eitt avmarkað útboð eftir ávísum tøkniligum førleikum, nevniliga OutSystems. Aðrir viðkomandi førleikar, sum t.d. at hava vitan og royndir við at fremja slíkar kt-verkætlanir í verki, ella at kunna seta seg inn í lógartengdar administrativar skipanir, er ikki partur av útboðnum.

Harafturat er ætlanin, at almenni stovnurin TAKS við ráðgeva skipar menningararbeiðið saman við innkeyptari arbeiðsmegi. Stovnurin tekur hervið veitaraskylduna at veita eina KT-skipan á seg sjálvan. Tað er eisini vert at nevna, at tá arbeiðið soleiðis verður tikið inn á ein stovn, verða uppgávurnar at seta krøv til loysnina, at veita kt-loysnina og at hava eftirlit við arbeiðinum útinntar á sama stað. Tað fæst neyvan munagott eftirlit tá ein hevur eftirlit við sær sjálvum. Betri er, at veitingarskyldan er hjá kt-veitaranum so kundin (TAKS) kann tryggja sær, at veitingin er í tráð við ynsktu veitingarnar og sambært avtalu.

Sambært lógaruppskotinum er kostnaðurin mettur at verða 11 mill. Hetta er ein stór kt-verkætlan í føroyskum høpi. Men orsakað av útboðsleistinum, so er ikki møguligt at siga hvørt hetta er tann rætti kostnaðurin ella besta loysnin. Eisini er lýsingin av komandi nýggju skipanini so mikið leys, at játtanarmynduleikin hevur avmarkaðan møguleika at hava eftirlit við nýtsluni av játtanini.

Sp/F Klintra,
Tórshavn 8. mars 2024

Jógvan K. Glerfoss, stjóri

Klintra - viðmerkingar til løgtingslóg um nýggja barsilsskipan LM-063-2023.pdf

Navn	Dagfesting
Jógvan Kristiansson Glerfoss	2024-03-08

Skjalprógv

samleikin Jógvan Kristiansson Glerfoss

Skriva

Hetta skjal er undirskrivað við elektroniskari undirskrift sambært ES fyriskipan 910/2014 um PADES – PDF Advanced Electronic Signatures.